# Elin er ein av verstu bilførarunum í Danmark

**Í kvøld er finalan í sendingini "Danmarks Værste Bilist", ið TV Danmark sendir, í finaluni er føroyska Elin Christensen, ið er ræðslusligin fyri at koyra bil**

»DANMARKS VÆRSTE BILIST«
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Elin Christensen er í finaluni í kappingini um ikki at gerast versti bilførari í Danmark, tí sonurin Arnhold hevur meldað hana til.*

Elin Christensen er 47 ár, føroysk og býr í Jútlandi stutt úr Århus. Hon er so ræðslusligin fyri at koyra bil, at hon hevur megnað at verið ein av teimum níggju, sum sluppu við í sendingina Danmarks Værste Bilist á TV Danmark. Í sendingini hevur hon vunnið á sjey av teimum verstu bilførarunum og er nú ein av tveimum í finaluni.

Tað er sonurin Arnhold, ið hevur meldað mammuna til. Hann greiddi í tilmeldingini frá, at hon ikki tordi at koyra longur enn til handilin í grannalagnum í Hornslet við Århus, har tey búgva. Hann var sannførdur um, at hon var ein av ringastu bilførarunum í Danmark. Við finaluplássinum hevur Elin prógvað, at hann hevði rætt og kanska eisini, at hon hevur alla orsøk til at vera ræðusligin.

Nú eru bert Elin og 24 ára gamla Mie úr Roskilde eftir í kappingini. Um hetta er ein heiður, er tó rættuliga ivasamt. Í sendingini í kvøld, skulu tær báðar upp í teoriroynd. Sambært TV Danmark dumpa báðar, og svarini eru skelkandi. Men hóast talan er um teir báðar ódugnaligastu bilførararnar í Danmark, so seta sjónvarpsvertinnan Lisbeth Janniche og dómararnir seg inn í ein bil og koyra gjøgnum innara part av Keypmannahavn í tøttu seinnapartsferðsluni ein fríggjadag fyrst við tí einu og síðan hinari við róðrið.

Lisbeth Janniche setir seg á baksetrið saman við Psykologinum Karen Schultz, meðan koyrilærarin Niels Andersen hættar sær at sita frammanfyri.

Sambært serfrøðingunum, eru báðar tvær óvanliga ódugnaligar og koyra óforsvarligt, Tað verður spennandi at vita, um vit føroyingar eiga tann versta bilføraran í Danmark, men ikki minst um øll sleppa heilskalaði burtur úr hesum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi og um kvøldið regn ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av landsynningi og regn, seinnapartin minni vindur av ymsum ættum og ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, men seinnapartin lot av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin fleyr til gul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men sunnudagin veksur hann vindin upp í skrið av landsynningi og suðri og regn. Hitin millum 5 og 9 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -10 |
| Nuuk | -4 |
| Qaqortoq | -1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 18 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 15 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 18 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | -- |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 970 hPa. á 46N-23V fer spakuliga í landnyrðing. Ein veikur hátrýstryggur vestan fyri Skotland verður yvir Føroyum mikumorgunin.




**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Írlandi fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikukvøldið.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/10 kl. 06[00]– 31/10. 06[00]. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í okt.: - 4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 23,0 mm – mált frá 30/10 kl. 06[00]– 31/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 213,5 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 26. oktober | Mánin longst frá jørðini |
| 2. november | Tendring |
| 10. november | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. Nov. | 05.37 | 17.57 | 04.37 | 16.57 | 04.52 | 17.12 | 07.37 | 19.57 | 08.37 | 20.57 | 03.52 | 16.12 | 02.52 | 15.12 | 05.52 | 18.12 | 06.52 | 19.12 | 05.22 | 17.42 | 06.37 | 18.57 |
| 2. Nov. | 06.18 | 18.40 | 05.18 | 17.40 | 05.33 | 17.55 | 08.18 | 20.40 | 09.18 | 21.40 | 04.33 | 16.55 | 03.33 | 15.55 | 06.33 | 18.55 | 07.33 | 19.55 | 06.03 | 18.25 | 07.18 | 19.40 |
| 3. Nov. | 07.03 | 19.26 | 06.03 | 18.26 | 06.18 | 18.41 | 09.03 | 21.26 | 10.03 | 22.26 | 05.18 | 17.41 | 04.18 | 16.41 | 07.18 | 19.41 | 08.18 | 20.41 | 06.48 | 19.11 | 08.03 | 20.26 |
| 4. Nov. | 07.52 | 20.18 | 06.52 | 19.18 | 07.07 | 19.33 | 09.52 | 22.18 | 10.52 | 23.18 | 06.07 | 18.33 | 05.07 | 17.33 | 08.07 | 20.33 | 09.07 | 21.33 | 07.37 | 20.03 | 08.52 | 21.18 |
| 5. Nov. | 08.46 | 21.14 | 07.46 | 20.14 | 08.01 | 20.29 | 10.46 | 23.14 | 11.46 | - | 07.01 | 19.29 | 06.01 | 18.29 | 09.01 | 21.29 | 10.01 | 22.29 | 08.31 | 20.59 | 09.46 | 22.14 |

5 707265 100036 >